Runavíkar kommuna

## Námsfrøðingur/hjálparfólk til Dagstovnin í Oyndafirði

Á Dagstovninum í Oyndarfirði ganga 14 børn í aldrinum 0 – 7 ár.

Søkt verður eftir:
Námsfrøðingi at byrja 11. august. Starvið er 20 tímar um vikuna.
Um námsfrøðingur ikki søkir, verður hjálparfólk sett í staðin.

**Vit ynskja at tú:**
- hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og teimum vaksnu
- hevur góð samstarvsevni og kanst arbeiða sjálvstøðugt
- hevur hug at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag fyri børnunum
- hevur hug til at skapa og seta dám á dagstovnin

**Vit bjóða**
- Eitt spennandi arbeiðspláss, har pláss er fyri ymiskleika
- Eitt arbeiðspláss har tú kemur at hava ávirkan
- Góðar arbeiðsumstøður
- Hollan pedagogiskan stuðul frá leiðsluni

**Meira fæst at vita:**
um starvið við at venda sær til Bessa Bjarnason leiðara á tlf 237002

**Setanarviðurskifti:**
Pedagogur/hjálparfólk verður sett eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommununala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn, við møguligum avriti av prógvi og viðmælum, skal verða Runavíkar kommunu í hendi í seinasta lagi 04.08.2008 kl. 12.00.

**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur 26
Postrúm 139
610 Saltangará

STUÐULSSTOVNURIN

## Summarfrí

Vegna summarfrí er Stuðulsstovnurin stongdur frá 14. juli. Opið verður aftur 11. august.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

Runavíkar kommuna

## Dagrøktari til Dagrøktina á Skála

**Dagrøktin á Skála**
Í dagrøktini starvast 15 dagrøktarar, spælistova er knýtt at dagrøktini, har dagrøktari vitjar eina ferð um vikuna.

**Vit bjóða**
- Eitt sjálvstøðugt og fjølbroytt starv
- Hollan pedagogiskan stuðul frá leiðsluni
- Skipað tilknýti til spælistovuna

**Vit vænta at dagrøktarar**
- kunna arbeiða sjálvstøðugt
- hava hug og áræði at skapa ein tryggan og mennandi gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum
- hava góðar umstøður at ansa børnum inni og uttanfyri

**Setanarviðurskifti**
Dagrøktarar eru løntir eftir sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Ein triðingur av lønini verður roknaður sum útreiðslur í sambandi við dagrøktina og er tí skattafríur.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til dagrøktarleiðaran Sonny Djurhuus á tlf. 442059/586004

**Umsókn**
Skrivlig umsókn skal verða Runavíkar kommunu í hendi í seinasta lagi **21. juli.**

**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur 26
Postrúm 139
610 Saltangará

Runavíkar kommuna

## Avloysari til Kunningarstovuna í Saltangará

Søkt verður eftir avloysara fyri leiðaran á Kunningarstovuna í Saltangará, sum fer í barnburðarfarloyvi.

Tørvur er á avloysara at byrja skjótast gjørligt og til 1. mai 2009. Talan kann møguliga verða um leingjan fram til 15. august 2009.

Nærri fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við kommunuskrivstovuna tlf. 417000.

Freistin at søkja avloysarastarvið er 18. juli kl. 12.00.

Umsóknin skal sendast til: Runavíkar kommunu, Heiðavegur 26, 600 Saltangará

**Runavíkar Kommuna**

SUNDA KOMMUNA

## Starvsfólk til dagtilhaldið Blákolluna á Oyri

Søkt verður eftir fólki at skipa fyri í Dagtilhaldinum á Oyri, umframt at luttaka í menningini av eldraøkinum í kommununi sum heild. Byrjað verður 1. septembur 2008 ella eftir nærri avtalu.

Arbeiðstíðin er sett til 20 tímar um vikuna.

**Førleikakrøv**
Tann, ið settur verður, eigur at hava serligan áhuga fyri at skapa góðar karmar um eldraárini hjá borgarunum, so teir fáa ein innihaldsríkan og heilsugóðan gerandisdag.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi **hósdagin 31. juli, kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um starvið á telefon 471022 ella 771023.

**Umsóknir skulu sendast til:**

**Sunda Kommunu**
Oyrarbakkavegur 3
400 Oyrarbakki

*Dagtilhaldið Blákollan lat upp 15. februar 2007. Har er opið hvønn týsdag og hósdag seinnapart. Dagtilhaldið er fyri borgarar úr allari kommununi og hevur støðugt vaksandi undirtøku. Skipað verður javnan fyri tiltøkum av ymsum slagi. Annars fáast fólk við ymiskt ítriv, kortspæl, læra seg at brúka teldu og við kropsvenjing.*

Runavíkar kommuna

## Frá Runavíkar kommunu og Kunningarstovuni

Kommunuskrivstovan er stongd vegna summarfrí í tíðarskeiðnum frá 21/7 - 8/8 2008.

Tekniska deild er tó opin í viku 29 við avmarkaðari arbeiðsorku.

Kunningarstovan er opin hesar tíðir í summar:
Mánadag - fríggjadag: kl. 9.00 - 17.00.
Leygardag: kl. 10.00 - 13.00.

Tey, sum hava átrokandi ørindi til kommununa meðan skrivstovan er stongd, kunnu venda sær til Kunningarstovuna.

**Runavíkar kommuna og Kunningarstovan**

Lesið Sosialin -so eru tit við!